Tíðindabrævið
Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 2 juni 2001 2. árg.

# Úr Mykinesi til Espevær

Fyrst í mai mánaði vóru 2 umboð fyri útoyggjarnar í Føroyum og vitjaðu í Noregi. Innbjóðingin kom frá fyrireikarunum av tí stóra tiltakinum ”Kystsogevekene” ið er ætlað at samansjóða smáu oyggjarnar við Vesturstrond Noreg. Endamálið við fundinum var at kanna møguleikan fyri at víðka tiltakið til eisini at fevna um Útoyggjarnar í Føroyum og Vestmannaoyggjarnar.

Undirritaða, og Katrina Johannesen, úr Mykinesi umboðaðu útoyggjarnar í Føroyum.

**Somu trupulleikar**

Bæði Noregi og Ísland hava júst somu trupulleikar sum Føroyar, tá talan er um menning av útjaðaranum, bæði viðvíkjandi fólkasamanseting, fráflyting, ov fáum arbeiðsplássum o.ø. Men tað, sum var mest áhugavert, var kunningin um, hvussu og hvat okkara grannatjóðir gera fyri at bøta um hesi viðurskifti.

**Espevær eitt hugtakandi dømi**

Í Espevær búgva í dag160 fólk, men fyri bert 9 árum síðani var fólkatalið nógv lægri. Vantandi trivnaður og fá arbeiðspláss gjørdu oynna lítið áhugaverda sum bústað. Skuldi oyggin ikki avtoftast, var neyðugt við munagóðum tiltøkum. Ein verkætlan var sett á stovn fyri at bjarga oynni. Støðið í verkætlanini var at grava fram allar møguleikar, ið vóru at finna í oynni, alt frá søguliga umhvørvinum til rávørugrundarlag og eginleikarnar hjá íbúgvunum.

Úrslitið av arbeiðnum er sjónligt í dag. Fleiri ungar familjur flyta til oynna, ið er vorðin ein av vakrastu blettunum í Norska skergarðinum. Bygdin er sera væl hildin, søguligir bygningar og fornminni eru endurreist og verða brúkt í ferðavinnuhøpi. Ein nútímans ferðavinnudepil er bygdur, at hýsa tí støðugt vaksandi ferðafólkastreyminum til oynna, ið bygdafólkið serviserar.

Fyri at fáa fleiri arbeiðspláss í oynni var eitt virki sett á stovn, ið framleiðir úrdráttir úr laksi.

Frá íbúgvunum í Espevær er boðskapurin greiður ”menningin má hava grundarlag í lokalsamfelagnum. Bygdirnar noyðast sjálvar at taka tey stóru tøkini, og har er samanhald tann mest týðandi tátturin. Tað er eisini umráðandi, at søkja sær serkøna hjálp tá eitt stirvið bygdarsamfelag skal byrja at samskipa og samstarva. At úrslitini eru so góð á Espevær kemur eisini av, at einstaklingar, feløg og almennir myndugleikar hava stuðlað tiltøkunum.



Sjóvegissambandið til Espevær er á hægri støði enn til Mykines.



Espevær marknaðarførir seg í dag sum ” ein eksklusivur útpostur, eitt bilfrítt eksotiskt stað at búgva”.

**Burðardygg vinna og mentanarsøgulig landsløg**

Í Hordaland Sókn eru fleiri verkætlanir, ið hava til endamáls at stuðla menning av smáoyggjunum. Ein av hesum er “Burðardygg vinna í lokaløkinum” (BNL). Henda verkætlan skal skapa nýggjar vinnur við støði í tí tilfeingi sum er á hvørjum einstakum staði. Sama útgangsstøðið sum menningin av Espevær bygdi á. Eitt annað stórt tiltak ið søknin er partur av, er NAVE, ið er ein netverksætlan, ið leggur dent á samstarv ímillum mentanarøkini í Norðuratlantshavið, við høvuðsdenti á umhvørvi og søgu. Føroyar eru við í hesum tiltaki, umboðaðar av Føroya Fornminnasavni. Ætlanin er eisini, at útoyggjarnar í Føroyum skulu gerast ein virkin partur í hesum tiltaki.

**Samstarv á lokalstøði landanna millum**

Úrslitið av fundinum var ein staðfesting av, at tørvur er á einum samstarvi, ið skapar sjónlig úrslit í lokaløkinum har tey búsettu fáa ein virknan leiklut. Semja var um at víðka tiltakið ”Kystsogevegene” til eisini at fevna um Føroyar og Ísland. Hetta merkir at samstarvið kemur at fevna um burðardygga vinnu á útoyggjum, m.a. samstarv innan ídnað, útbúgving og gransking og eitt samstarv, ið skal styrkja tað mentanarsøguliga umhvørvið á útoyggjunum.

Hetta inniber m.a. at skipað verður fyri verkætlanum har tað søguliga umhvørvið á útoyggjunum verður endurreist. Søga og mentan skal kunna endurspeglast í umhvørvinum. Hetta skal gerast til frama fyri eina skipaða ferðavinnu, men ikki minst fyri at skapa eitt umhvørvi, ið er so tiltalandi og áhugavert at tað vekjir áhuga hjá fólki at búgva og búseta seg á hesum støðum.

Smábygdirnar skulu tó ikki gerast ”fornminnasøvn” men hugkveikjandi støð, har nýggj tøkni ger, at tað ókenda verður kent, meðan tað samstundis verður leitað eftir vegum og træðrum ið stigvíst hava ført okkum til dagin í dag.

Felagsskapurin NORA hevur longu víst tiltakinum áhuga.

*Olga Biskopstø*



## Grannastevna

**Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur**

Í skjótt nógv ár hevur verið upp á tal at broyta kommunubygnaðin í landinum. Í 1996 samtykti landsstýrið at seta nevnd at gera uppskot um eina nýggja kommunala skipan í Føroyum. Í juni 1998 kom Kommununevndin loksins við álitinum 'Frágreiðing um kommunurnar – Nýggj kommunal skipan í Føroyum'. Síðani tá hava nógv uppskot verið um, hvussu landið skal skipast frameftir.

eingin burðardygg økismenning gerst veruleiki uttan:

·At útjaðarin verður styrktur munandi, soleiðis at fyrisiting, ábyrgd og avgerðarrættur á t.d. týdningarmiklum trivnaðarøkjum verða lokalmál (t.e. verða loyst av myndugleika í økinum).

·At meiri fleksiblar og hóskandi loysnir verða settar í verk kring landið, soleiðis at til ber at krevja sama *góðskustig* í Tórshavn, Klaksvík og Fámjin innan t.d. barnaansing (tað merkir *ikki* somu loysnir).

·At økini fáa nóg mikið av fyrisitingarligum uppgávum, soleiðis at 'lyklafunktiónir' sum fjarskifti, samferðsla, postflutningur o.a. loysa seg eftir *marknaðarbúskaparligum treytum* kring alt landið.

at gera, sum tær vilja, um eingin peningur er at gera nakað fyri orsakað av lítlari kommunalari skattainntøku. Alt tos um, at fyrisitingarligar uppgávur skulu leggjast út hongur í leysum lofti. Alt veruligt kjak um eina skipan, sum ger tað møguligt hjá økjunum at taka við hesi ábyrgd til fulnar, má byggja á eina loysn á spurninginum um burðardyggar eindir.

Privatiseringin av samfelagsligum lyklafunktiónum (sum t.d. fjarskifti og samferðslu), oljuvinnan, fjarskiftissamfelagið og altjóðagerðin – øll hesi viðurskifti krevja, at vitan, ábyrgd og avgerðarrættur verða ein náttúrligur partur av at liva og virka í útjaðaranum. Hesum slepst ikki undan, um livilíkindi eisini frameftir skulu vera kring alt Føroya land. Felags-

# Framtíðar Føroyar – størri eindir eru alneyðugar

Júst í hesum døgum verður talað um eitt nýtt fyrisitingarligt býti millum land og kommunur. Henda hugsan tykist byggja á eina staðfesting um, at eitt meiri hóskiligt *ábyrgdarbýti* má ásetast millum mál, sum skulu loysast sentralt, og mál sum eiga at verða loyst lokalt. Hetta verður hildið at vera neyðugt, m.a. fyri at optimalar loysnir eisini kunnu finnast á spurningum, sum eru neyvt knýttir at ávísum lokaløki.

Fleiri ferðir hevur eisini verið lagt upp til, at Føroyar verða skiftar sundur í *færri*, men *størri* øki. Meiri og minni ítøkilig uppskot hava verið sett fram um at skifta landið sundur á sama hátt sum Føroyar eru skiftar sundur í t.d. *prestagjøld* (t.e. 8 øki), í *sýslur* (t.e. 6 øki), í *valdømi* (t.e. 7 øki), í *læknadømi* (t.e. 11 øki). Nú er so Økismenningarbólkurin komin við einum uppskoti um at skifta landið sundur í *fimm* lutfalsliga stórar eindir.

Hesi mongu uppskot, sum eru nevnd, gera tað eyðsýnt, at lutfalsliga breið semja er um, at vit hava brúk fyri størri fyrisitingarligum eindum í Føroyum. Men hví er tað so avgerandi við størri eindum? Í Økismenningarálitinum verður lagt upp til, at endamálið við at skapa lutfalsliga stórar felagsfyrisitingar fyri tey ymisku økini byggir á nakrar staðfestingar og grundleggjandi niðurstøður, sum bólkurin er komin til, og eru hesar í høvuðsheitum, at

Í Økismenningarálitinum verður eisini staðfest, at er politiski viljin á Føroya Løgtingi tann, at útjaðarin eisini skal verða við í eini framtíðarmenning av føroyska samfelagnum, er tað ikki nøktandi at flyta onkran hendinga skúla út á bygd. Veruleikin er tann, at uttan munandi nýhugsan verður útjaðarin ikki førur fyri at gerast partur í eini komandi samfelagsmenning, sum setur sera stór krøv til tann einstaka samfelagsborgaran.

Neyðugt er, at eitt tílíkt nýbýti samstundis byggir á eina broyting av verandi fyrisiting, sum er funktionelt uppbygd, t.e. at hon er fyrst skift sundur í ávísar funktiónir og síðani í øki. Í framtíðini mugu vit fáa eina skipan, har økini koma fyrst, og síðani funktiónirnar, soleiðis at dagliga fyrisitingin verður kring landið, men høvuðssamskipanar- og eftirlitsfunktiónir verða varðveittar sentralt.

Ein grundleggjandi staðfesting í hesum høpi er tann, at fyritreytir fyri miðspjaðing ikki eru til, sum nú er. Tað er neyðugt at teingja hugtakið *fyritreytir* upp í alt kjak um desentralisering av ábyrgd og fyrisiting. Tað gevur t.d. onga meining at tala um at *skapa karmar* fyri trivnað, útbúgving og vinnulív, um kommunurnar samstundis eru bundnar á hond og fót av stórari kommunuskuld. Tað gevur heldur onga meining at loyva lítlum kommunum

fyrisitingarnar skulu frameftir taka sær av ítøkiligum *økisspurningum*. Hinvegin skal landsmyndugleikin hava eftirlitsfunktiónina og tryggja, at fyrisitingarligar uppgávur verða samskipaðar og loystar til lítar kring landið av landspartafyrisitingum.

Ein skipan við felagsfyrisitingum kring landið kann báði gerast "glíðandi", har m.a. núverandi kommunuskipan verður varðveitt, og sum ein partur av einum



# Økismenning í Danmark

Í ár eru tvey álit um økismenning løgd fyri Løgtingið. Annað er Økismenningarálitið, sum viðgerð størri økini uttan fyri Havnina, og hitt er Útoyggjaálitið, ið viðgerð støðuna á útoyggjunum. Tað er tó ikki bara í Føroyum, at orðaskifti er um økismenning. Danska stjórnin leggur hvørt ár tvær frágreiðingar fyri Fólkatingið, ið lýsa hvussu tað gongur í teimum ymsu økjunum. Hesar báðar frágreiðingarnar fyri 2001 eru nýliga lagdar fram.

Onnur frágreiðingin kallast ”Regionalpolitisk redegørelse 2001”. Hendan frágreiðingin kom fyrstu ferð í ár 2000 og lýsir, hvussu lógir og umsitingarlig tiltøk ávirka búskaparligu gongdina í teimum ymsu økjunum, eins og hvat gerast kann fyri at venda eina møguliga skeivari gongd. Hin frágreiðingin kallast ”Landdistriktsredegørelse 2001”.




Hetta er ein frágreiðing, sum er løgd fram á hvørjum árið síðani 1997. Hendan frágreiðingin sigur frá gongdini í danska útjaðaranum, hvørjar avbjóðingar eru og hvørji tiltøk danska stjórnin hevur sett í verk til tess at styrkja útjaðaran.

Búskaparliga hevur tað gingið væl í Danmark síðani 1993. Vøkstur hevur verið í øllum økjum í landinum og arbeiðsloysið er eisini minkað. Og munirnir millum økini, tá tað kemur til inntøku og arbeiðsloysi, eru sambært frágreiðingini minkaðir. Tað eru tó øki í útjaðaranum, sum hava verið fyri eini verri gongd. Størsta arbeiðsloysið er á Bornholm, Lolland-Falster, Sydfyn og Langeland. Tá ið tað kemur til gongdina í fólkatalinum, so hevur tað eisini tey seinastu 10 árini verið ein tendensur til, at ein miðsavnan er farin fram kring Keypmannahavn og í økinum kring Århus/Vejle. Harafturímóti er fólkatalið fallið í pørtum av útjaðaranum.

”Landsdistriktsredegørelsen” er ein frágreiðing, ið lýsir gongdina og avbjóðingarnar hjá danska útjaðaranum. Tað danir rópa ”landsdistrikt” umfatar øki uttan fyri býarøkini. Eitt býarøkið skilja danir sum eitt øki, har tað búgva minst 200 fólk og har tað ikki eru meiri enn 200 metrar millum húsini. Almenna málið hjá donsku stjórnini er, at ein burðardygg menning av danska útjaðaranum skal fara fram, soleiðis at skaptur verður ein sterkur útjaðari, ið hevur tilboð um arbeiði og eitt fjølbroytt útboð, tá ið tað kemur til tænastur, mentan og frítíðarmøguleikar.

Búskaparliga gongdin í teimum donsku kommununum hevur verið positiv síðan 1994. Hetta er bæði galdandi fyri bý- og landkommunur. Danski útjaðarin sum heild hevur havt eitt støðugt fólkatal seinasti árini og tað tykist sum ávísir møguleikar eru at fáa fleiri fólk at flyta til útjaðaran. Ein spurnarkanning, ið varð gjørd í november og desember 2000, vísti, at 16% av donsku býbúgvunum antin høvdu ætlanir ella ynski um at flyta ”ud på landet”. Hetta vóru serliga fólk *yngri* enn 30 ár!

Landbúnaðurin er ein av týdningarmiklastu vinnunum í landkommunum, og stórar broytingar fara fram innan danska landbúnaðin. Millum annað broytast ognarviðurskiftini soleiðis, at eindirnar gerast færri og størri. Í tíðarskeiðnum frá 1990 til 1999 minkaði tali av landbúnaðarfyritøkum við ikki minni enn 27%. Serliga er tað talið av fyritøkum, sum hava svínahald, ið eru blivnar færri. Danski útjaðarin upplivir sostatt enn einaferð eina broytingartíð, har landbúnaðinum tørvar alsamt færri arbeiðsfólk. Tí er tað ein stór avbjóðing hjá danska útjaðaranum at skapa nýggjar starvs- og vinnumøguleikar.

Til tess at birta uppundir eina góða menning av danska útjaðaranum, verða nógv ymisk tiltøk gjørd, og eitt av hesum tiltøkunum er at stovna ein granskingardepil fyri útjaðaramenning - Center for Forskning af Udvikling i Landdistrikterne. Hesin depilin varð stovnaður í februar 2001. Hetta er ein sjálvstøðugur granskingardepil, sum fer at hava tilknýti til Syddansk Universitet í Esbjerg. Nýggi depilin verður fíggjaður av Indenrigsministeriet, Fødevareministeriet, nøkrum kommunum í Ribe amt eins og Syddansk Universitet í Esbjerg.

Endamálið við deplinum er at skapa grundarlag fyri eini burðardyggari menning av danska útjaðaranum. Settur leiðari er Hanne W. Tanvig, ið hevur arbeitt sum lektari við Institut for Miljø- og Erhvervsøkonomi við Syddansk Universitet. Formaður í stýrinum fyri depilin er Thorkild Ljørring Pedersen, sum eisini er formaður fyri Landdistriktenes Fællesråd, ið er eitt samtak av feløgum, ið taka undir við, at donsku bygdirnar og landdistriktini vera varðveitt og styrkt www.landdistrikterne.dk.

---

nýggjum býti millum ta sentralu fyrisitingina og økini kring landið, har eisini sjálv kommunuskipanin verður broytt samstundis.

Felagsfyrisitingin kann verða bygd upp soleiðis, at tey, sum í dag arbeiða hjá kommununum, verða ’flutt yvir’ í felagsfyrisitingina. Sostatt verður ikki í fyrstu atløgu talan um beinleiðis sparingar í starvsfólkakostnaði, men hinvegin verður fyrisitingin heldur ikki darvað av einum tíðarskeiði, har umsitingin skal seta eina rúgvu av nýggjum starvsfólkum inn í lokal viðurskifti.

Eftir at nýggja fyristingin hevur fótað sær, kemur hetta sjálvandi at føra til broytingar, tí at uppgávurnar broytast líðandi. Eftirspurningur verður eftir fakfólki, sum skulu taka sær av nýggju uppgávunum hjá felagsfyrisitingini, og kemur hetta at føra til eina heilt aðra samanseting av starvsfólki, enn tað vit kenna frá kommunalari umsiting í dag.

’Umhvørvi’ – í einum sera breiðum týdningi – krevst fyri at fáa fólk við góðari útbúgving at støðast uttan fyri miðstaðarøkið. Nýggja skipanin við størri felagsfyrisitingum kring landið er ein av fyritreytunum fyri yvirhøvur at skapa tílík ’umhvørvi’ í útjaðaranum. Eitt betri lokalt umhvørvi fer at draga fólk við góðari útbúgving til sín, og júst hesi fólkini kunnu verða við til at styrkja umhvørvið í útjaðaranum enn meiri. Hervið verður ein ’ónd ringrás’ brotin og ein góð skapað.

## Avlop í 2000

Roknskapurin fyri fyrsta heila árið hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning fyriliggur nú. Granskingardepilin hevði ein umsetning uppá knappar tríggjar milliónir í 2000, og roknskapurin javnvigar við einum lítlum avlopi.

# Fyritøka í Suðuroy veitt tænastu til bilídnaðin í USA

Heimurin gerst minni og minni, verður ofta tikið til – og hetta kann sterkstreymsverkfrøðingurin Heri Mortensen í Vági uttan iva taka undir við, eftir at hann í januar mánaða var í USA og arbeiddi fyri eina fyritøku innan bilídnaðin.

**El & Automatik**
Heri Mortensen eigur fyritøkuna El & Automatik í Vági, ið varð stovnað í 1998. El & Automatik veitir tænastur innanfyri vanligar el-installatiónir til ídnaðin og húsarhald, men harumframt veitir El & Automatik eisini tænastur innan eltalvur og stýringar.

**PLC-stýringar**
Hesar stýringar – nevndar PLC-stýringar, sum knýttar eru at PLC-teldum (PLC: **P**rogrammable **L**ogical **C**ontroller) – verða brúktar til automatiska stýring av størri anleggum og maskinum, ið tørva nógvar sjálvvirkandi funktiónir. Hvat maskinum viðvíkur, vil hetta í stuttum siga, at nógvar fastar innstillingar kunnu lesast inn í PLC-telduna á maskinuni. Á hendan hátt slepst m.a. undan at stýra og innstilla maskinu manuelt og sparir hetta nógva tíð, eisini tá onkur lítil justering skal gerast ella um farið verður undir eina nýggja framleiðslu við maskinuni. Harumframt kann eisini lesast eitt forrit inni í PLC-telduna, ið automatiskt leitar eftir feilum við maskinuni og vísir á, hvar feilur eru og hvussu hann kann rættast, um ella tá ið okkurt hendir við maskinuni.

Ein annar fyrimunur við PLC-stýringum er, at PLC-teldan kann knýtast til telefonnetið og á hendan hátt kann tænastuveitarin uttan størri hóvasták fara inn á maskinuna um telefonnetið og vísa á feilir og gera rættingar, uttan sjálvur at vera til staðar.

**Heri í USA**
Um jóltíðir í fjør vórðu boð eftir Hera úr Ohio í USA. Fyritøkan Kamco Industries, ið framleiðir billutir til m.a. Honda, skuldi gera høvuðseftirlit við og broyta innstillingarnar á eini maskinu. Fyritøkan arbeiðir uttan íhald alt samdøgrið og varð tí neyðugt at stytta sum mest um tíðina, tá høvuðseftirlit varð gjørt og stýringin á maskinuni broytt.

Maskinan á Kamco Industries er upprunaliga keypt í Danmark – frá fyritøkuni Smetek, ið Heri arbeiddi fyri, eftir at hann varð liðugur við útbúgvingina á Tekniska Háskúlanum í Århus. Heri var í fjør hjá Smetek í Danmark og projekteraði, teknaði el-diagrammið og programmeraði PLC-stýringina til maskinuna til Kamco Industries. Hetta var í apríl mánaða. Seinni, í juni mánaða, gjørdi hann forrit til PC-brúkaraflatuna – hetta arbeiðið bleiv gjørt í Vági. Og í august var Heri so í USA og installeraði tey seinastu forritini og setti maskinuna í drift. Hetta arbeiðið var ígjøgnum Smetek, meðan Kamco um jóltíðir beinleiðis vendi sær til Hera.

Heri vísir á, at broytingar í PLC-stýringini kundu væl verðið gjørdar í USA, men at tað helst hevði tikið longri tíð, tí tað er altíð lættast, at tann sum hevur gjørt stýringina av fyrstan tíð, ger broytingar og justeringar, tí hann kennir uppbyggingina av stýringini, talan er um.

Fyri at spara sum mest av tíð varð sent boð eftir Hera, og framleiðslan varð bara steðgað í nakrar fáar tímar, meðan hann gjørdi broytingarnar.

- Sjálvsagt var eg væl fyrireikaður heimanifrá, sigur Heri, og tí tók tað lítla tíð at gera broytingarnar, tá eg var á verksmiðjuni hjá Kamco í januar mánaða.

Umframt arbeiðið fyri Kamco Industries í USA, hevur Heri eisini verið í Onglandi og í Danmark og gjørt PLC-stýringar fyri fyritøkur har, men Heri ásannar, at hesi arbeiði bara eru eftirvirkningar frá tíðini, tá hann arbeiddi í Danmark. Tó so, Heri hevur í vár fingið ein fyrispurning um at koma og gera stýringar til eina maskinu, sum ein donsk fyritøka í USA hevur selt til Costa Rica.


*Maskinur hjá Kamco USA hava PLC stýriskipan, ið er forritað av El & Automatik í Vági*

Sum er hevur Heri eisini gjørt slík arbeiðið í Føroyum, men sigur hann, at tað er ringt at sleppa inn á føroyska marknaðin, tí her eru fyritøkur, ið bjóða tænastur líkar hesum. Tó ásannar Heri, at tað gongur framá og hevur hann góðar vónir, hvat føroyska marknaðinum viðvíkur, orsakað av góðu gongdini í føroyska búskapinum.

**Ætlan um heildarveiting innan el**
Framtíðarætlaninar hjá Hera eru, at El & Automatik skal gerast ein heildarveitari av tænastum innan el, t.v.s. gera projekteringar, installatiónir og harumframt el-talvur og stýringar. Hetta krevur, at fyritøkan hevur fleiri starvsfólkum, so at Heri burturav kann taka sær av projektering og gerð av el-talvum og PLC-stýringum, meðan onnur starvsfólk taka sær av installatiónunum.

- Sum er, so er ov lítið arbeiði við PLC-stýringum, og tað kann, sum frá líður, gera tað trupult at fylgja við fakliga, sigur Heri, og tí er tað eisini neyðugt, at El & Automatik fær størri lut í føroyska marknaðinum.

Møguleikin fyri hesum skuldi verið til staðar, tí tá tað ber til at veita tænastur til bæði USA og Onglands, so eigur Suðuroyarfjørður ikki at vera nøkur forðing.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Mortensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent